

Kongsborg til arbeiðis á Knarrfeltinum í Norðsjónum.

# Føroyska Skansi við í nýggjari framleiðslu í Norra

**Jan Müller**

19.03.2015 - 16:58

Oljan.fo

Nú um dagarnar varð spildurnýggja oljufeltið Knarr á norska landgrunninum tikið í nýtslu. Tað er oljufelagið BG, sum er fyristøðufelag. Fyri føroyingar er júst henda framleiðslan av stórum áhuga, tí føroyska Skansi Offshore er partur av hesi stóru og spennandi verkætlan. Ikki færri enn tvey av skipunum hjá Skansi Offshore eru knýtt at Knarr-feltinum.

Tey eru Kongsborg og Tórsborg. Skansi hevur í fleiri ár havt tætt samstarv við BG, og sambært úttalilsum frá einum av stjórunum í BG til oljan.fo í fjør, so er oljufelagið sera væl nøgt við tænasturnar frá føroyska felagnum. Og hetta er eisini orsøkin til, at tað hevur borið til hjá tveimum av skipunum hjá Skansi at hava sáttmálar við eitt av teimum stóru og virknu oljufeløgunum í Norðsjónum.

Knarr oljukeldan, sum varð funnin í 2008, goymir 80 mill. tons av olju. Framleiðslan fer fram á einum spildurnýggjum framleiðsluskipi, Petrojarl Knarr, (FPSO), sum er bygt í Korea. Umframt BG eru eisini oljufeløgini Idemitsu, Wintershall og Dea við í verkætlanini.




